# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Syrgiliga Skálabergmálið

Enn er eingin endalig loysn funnin á málinum um tikna/rænda Skálaberg. JFK bíðar framvegis eftir sektaruppskoti frá russum. Tað hugvekjandi í hesum máli eru nógvu og ymsu signalini, sum koma úr øllum ættum. Og nú eru so eisini gitingar vornar partur av hesum torskilda máli. Eru tað russar, sum eru gemenir sjórænarar? Er tað teirra skipan, sum er burokratisk ella korrupt? Er tað reiðararíið í Føroyum, sum hevur sovið í tímanum? Sum hevur forbrotið seg? Eru tað okkara myndugleikar, sum hava snorksovið?

Tað liggur í luftini, at reiðaríið skal rinda einar 5 mill. kr. í sekt fyri ikki at hava hildið galdandi avtalur. Skipið fiskar av kvotuni hjá Sundaberg, og hetta hevur Fiskimálaráðið kunnað russar um. Men móttakarin í russisku skipanini hevur “gloymt” at senda hetta víðari til sínar samstarvsfelagar eftir, at hann fór úr starvið. Hvat er gjørt fyri tryggja sær, at hesi boð komu fram? Hvussu er mannagongdirnar í Fiskimálaráðnum?

Hvørjum skal man trúgva. Er talan um lógarbrot frá føroyskari síðu, er talan um manglandi embætisførslu frá føroyskari síðu ella er tað bara burokratiska og stóra russiska skipanin, sum er so torfør at gjøgnumskoða?

Eftir okkara tykki er hetta eitt sera prinsipielt mál. Og tí eiga allar upplýsingar at koma fram og verða vigaðar á eini vekt. Samstarv millum okkum og russar hevur vanliga gingið væl, og russiski konsulin í Føroyum segði við Sosialin í farnu viku, at atburðurin hjá russum átti ikki at skiljast sum hevnd av nøkrum slag sum tøkk fyri onkra misgerð vit hava framt móti russiskum áhugamálum. Konsulin er skilamaður og eiga vit helst at taka hansara orð fyri góða vøru.

Spurningurin vit seta okkum er: hava okkara fiskiveiðumyndugleikar og okkara múgvandi Uttanríkisráð gjørt nóg mikið fyri at loysa hesa uppgávuna. Hava tey troytt allar kreftir og eitt nú brúkt russiska konsulin í Føroyum fyri at finna loysnir. Hava tey havt nóg tætt samband við danska uttanríkisráðið og russisku sendistovuna í Danmark?

Her eru alt ov nógvir ósvaraðir spurningar. Tað er ikki ein spurningur um at finna syndabukkar, men allur sannleikin má fram um hetta málið, tí okkara samstarv við russar er so týdningarmikið, at tað mugu ikki koma kílar í vegna misskiljingar, skeivar ella manglandi avgerðir og eftirlit ella fyri tað vánaliga embætisførslu.

Okkara tankar fara til føroysku sjómenninar umborð á Skálabergi. Teir hava í veruleikanum verið hildnar gíslar í eini trætu teir eru fullkomiliga ósekir í. Hava almennu Føroyar gjørt nokk fyri at fáa teir heimaftur! Vónandi verður málið loyst sum skjótast.

**Sosialurin**

# Pilotar offur fyri lygisøgum

SJÚRÐUR SKAALE



**Eg skilji væl, at Magni Arge sendi pilotunum nógv umrødda brævið. Men hevði hann kent sannleikan, hevði hann ikki gjørt tað**

1. oktober legði nevndin fyri Vága floghavn fram síni tilmæli í sambandi við útbygging av vøllinum í Vágum.

Mælt varð til at fara longur enn tað, sum hevði ligið í kortunum. Vøllurin skuldi ikki vera 1600, men 1800 metrar, umframt at munandi útbyggingar skuldu gerast av terminalinum. Tosað varð um »tørv og krøv 20-30 ár fram«, og prísurin var væl hægri enn tað, sum tosað hevði verið um.

Og tað skuldi berast skjótt at. So skjótt, at arbeiðið skuldi bjóðast út longu hálvan desember.

Flogvøllurin er okkara týdningarmesta samferðsluíløga, og vit vóru fleiri, sum ikki kendu okkum ílatin til at trýsta á hvørki tann reyða ella tann grøna knøttin. Tí vildu vit hava meiri vitan.

**Kunnandi fundur**

Ein tann størsta vitanin um viðurskiftini í Vágum liggur sjálvsagt í royndunum hjá teimum pilotum, sum hava lent fleiri túsund ferðir á vøllinum.

Tí tók m.a. undirritaði stig til at skipa fyri einum fundi, har pilotar greiddu frá, hvat teir mettu um møguleikar og avmarkingar í Vágum.

Pilotarnir sum komu - einir 10 tilsamans - løgdu stóran dent á, at teir einans tosaðu sum privatpersónar, og at teir ikki á nakran hátt ynsktu at enda í nøkrum politiskum stríði. Teir vildu bara hjálpa okkum við at varpa ljós á málið. Alt var reint tekniskt. Teir greiddu ógvuliga sakliga frá viðurskiftunum í Vágum, soleiðis sum tey síggja út úr cockpittinum. Á sama hátt greiddi flogleiðarin væl frá teirri ætlaðu úbygginini, somuleiðis sæð úr einum flogtekniskum sjónarhorni.

Tað var als einki loyniligt við hesum fundi, sum fór fram í Løgtinginum. Sum eg skilti visti stjórin í Atlantsflogi eisini um fundin. Tað er heldur einki óvanligt við slíkum fundum. Teir verða hildnir alla tíðina. So seint sum í gjár var ein líknandi fundur um pensiónsmálið.

Eisini eftir henda fundin hava politikarar tosað við flogskiparar. Eins og ein stórur partur av tinginum var til almenna framløgu á Hotel Hafnia um útbyggingina í Vágum.

Tað er sjálvsagt, at politikarar vilja hava vitan. Avgerðin, sum skal takast, er jú sera týðandi.

**Pilotar gjørdir suspektir**

Men tíverri hendi júst tað, sum ikki mátti henda: Pilotarnir vórðu lagdir undir illgruna fyri at renna politisk ørindi!

Eitt nú dróg Tórbjørn Jacobsen, tann 9. november, pilotarnar inn í ta politisku sentrifuguna við hesum orðum:

»Í eina tíð hava loyniligir skýmaskotsfundir verið hildnir í Havn um landsins flogvallarviðurskifti. Útvaldir flogskiparar, í starvi hjá nationala flogfelagnum, aðrar staðir høvdu teir helst verið róptir "renegatar" og havt eina óvissa framtíðarlagnu, og serliga útpeikaðir politikarar hava dúgliga hitst, helst fyri at skáka ætlaðu útbyggingina í Vágum.«

Tórbjørn tosaði eisini um at »...ráðleggingar og spunasmíð fara fram í tøttum cellum, millum útvaldar pilotar og politikarar...«

Hetta var altso heilsanin, sum Tórbjørn Jacobsen hevði at bera hesum monnum, sum høvdu dittað sær at nýtt sítt talufrælsi. Siðiliga. Sakliga. Og ábyrgdarfult.

**Dialogur steðgaður**

Slaturin fekk tær ætlaðu avleiðingarnar: Pilotarnir fingu bræv frá leiðsluni í Atlantsflogi, sum legði ávís bond á teirra rætt at tosa um flogvallarmálið.

Tá hugsað verður um, hvat hevur verið sagt um pilotarnar, er als einki løgið í, at Magni Arge reageraði, sum hann gjørdi. Tí sjálvandi skulu pilotarnir ikki taka lut í suspektum virksemi.

Men tað hava pilotarnir heldur ikki gjørt. Ikki á nakran hátt. Teir hava eina og aleina greitt frá nøkrum viðurskiftum, sum heitt varð á teir um at greiða frá.

**Magni skuldi verið við**

Sum ein av stigtakarunum til fundin við pilotarnar eri eg sera harmur um tað, sum er hent í málinum. Teir fingu eitt lyfti - og tað er brotið.

Soleiðis kann politikkur tíverri vera...

Eg trúgvi kortini ikki at nakar av okkum, sum fingu dialogin við pilotarnar í lag, angrar tað. Tí tær avgerðir, sum skulu takast í flogvallarmálinum, mugu og skulu byggja á haldgóða vitan.

Og soleiðis er við øllum avgerðum. Tá Magni Arge tók avgerðina um at senda pilotunum tað nógv umrødda brævið, hevði hann ikki neyðugu vitanina. Hann reageraði upp á lygisøgurnar um fundin í tinghúsinum og aðrar fundir. Hann kundi ikki annað. Hann hevði jú ikki verið á nøkrum fundi.

Hevði hann verið við, hevði hann einki bræv sent!

# Bjørt Samuelsen og øl!

ODDMAR Á STEIG



Í sini tíð, 1907, vóru tað kvinnurnar, ið bardust og vunnu á rúsdrekkaóskilinum í Føroyum. Nú í 1009 ganga kvinnurnar á tingi á odda og »lokka« menninar - teir sýnast at vera sera veikir á hesum øki. Eg haldi, at vit eiga at standa ímóti sterkari øli í landinum, sjálvt um vit skulu standa einsamallir millum øll hini øllondini. Eg og mong við mær undrast, at kringvarpið - bæði sjónvarp og útvarp - geva so nógv rúm fyri reklamu av øli og brennivíni.

Góða Bjørt og allir tínir stuðlar, fái ein annan sunnan og uppbyggjandi hugburð, hvat er gagnligt fyri land okkara. Sum eg havi sagt við teg fyrr, øl og brennivín byggir ikki land!

Royn hendur at ávirka tínar starvsfelagar í tinginum at forða fyri sterkari øli uttanífrá enn tað, ið er loyvt í Føroyum. Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

**E.S.** Øl og brennivín stendur í stórari andsøgn til nýggju ferðslulógina. Royn at brúka vit og skil!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.